Stjørnan-Neistin 20-21 (8-12):

Neistin fekk luft

Við sigrinum á Stjørnuni fekk Neistin nakað av luft í botnstríðnum, soleiðis at niðurflytingarvandin mest sum má metast sum óveruligur

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Hondbóltslagið í Neistanum hevur verið heldur misjavnt hetta kappingarárið. Ætlanin var, at meðan menninir skuldu nýta árið til at byggja eitt nýtt lið upp, skuldu kvinnurnar hinvegin taka dystin upp við allar ovastu liðini í deildini.

Veruleikin hevur tó verið ein annar, og hjá kvinnunum hevur hann verið heldur daprari, enn ætlanin var. Fremsta orsøkin hevur helst verið mongu skaðarnir, sum hava rakt lyklaleikarar, og ringa gongdin hevur so við og við togað liðið alt nærri botninum. Lægsta punktið mundi vera, tá liðið herfyri tapti útídystin ímóti Tjaldri, soleiðis at munurin í botninum minkaði tvey stig, og niðurflytingarvandin soleiðis brádliga gjørdist heilt veruligur.

Hildu fast

Sunnudagin fingu neistakvinnurnar tó aftur gjørt hendan vandan nakað óveruligari, um enn hann ikki er heilt so fjarður og óhugsandi, sum hann annars hevur verið tey 71 árini, sum felagið hevur livað.

Tað eydnaðist nevnliga Neisatnum at vinna torføra útídystin í Klaksvík, og ikki minst varð hetta grundað á fyrstu løtuna av dystinum. Stjørnan hevði kanska roknað við, at talan skuldi gerast um ein lættan dyst fyri teirra viðkomandi, men her fóru tær so dyggliga skeivar.

Neistin legði fyri við fullari ferð, og áðrenn nakran veruliga vardi, høvdu tær skapt sær eina hampuliga trygga leiðslu. Og so ráddi um at verja borg. Við vanliga kontantum verjuspæli, góðum málmansspælið og so kontrarenningum niðan eftir vøllinum eydnaðist tað eisini alla tíðina at halda heimaliðið aftan fyri seg, og tó at tað til tíðir stóð heilt nógv á, so megnaðu tær at bláu at halda høvdið kalt í avgerandi løtununum. Nakað sum annars ikki er vanliga eyðkenni hjá einum liði, sum er í kreppu.

Burtur frá tí óhugsandi

Við sigrinum slapp Neistin sær sum sagt burtur úr annars óhugsandi niðurflytingarvandanum, sum seinastu vikurnar hevur hótt leikararnar sum ein vanliga veruleikafjar marra. Fýra stig eru nú niður til Tjaldur, og tó at kappingarárið enn er so langt ífrá liðugt, so fer hetta ivaleyst at geva somikið av ró, at stigini spakuliga fara at gerast fleiri, tó at tær neyvan skulu droyma um nøkur heiðursmerki hetta árið.

Hjá Stjørnuni var tapið hinvegin ein dyggur smeitur. Møguleikin var annars til, at liðið við tveimum stigum kundi leggja seg heilt fram í oddastríðið, men tann dreymurin má nú skjótast nakað fram í tíðina. Enn er tó ikki heilt leyst og liðugt. Komandi dystirnar skal liðið hitta ávíkavist Kyndil og StÍF, sum eisini stríðast við um bronsuna, og so er spurningurin, hvussu útgangsstøðið verður, tá VB og VÍF standa fyri framman.

Hóast fótliðið enn er nakað eymt, so var Mildrið Jacobsen ein týðandi partur av liðavrikinum, tá Neistin sunnudagin tók eitt stig úr naggatódnini, sum liðið hevur verið í seinastu mánaðirnar
Mynd: SáH

Dysturin í tølum

Stjørnan-Neistin 20-21 (8-12)

Málskjúttar:
Stjørnan: Danijela Ercevic 9(4), Joan M. Joensen 4(1), Natasha Stamenkovic 3(1), Una Olsen 2, Bára S. Klakstein 1, Gunnvør Isaksen 1
Neistin: Simona Dziugyte 8(5), Mildrið Jacobsen 5, Lív Sørensen 2, Susan Brockie 2(2), Ása á Neystabø 1, Súna Mørk 1, Christina Holm 1
Brotskøst: Stjørnan 8, Neistin 9
Útvísingar: Stjørnan 3, Neistin 5
Diskvalifikatión: Neistin 1 (Beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldur: Hartvig Joensen & Kári Hansen.

Jón Rói slapp inn

Nýggi Brøndby leikarin fekk seinna hálvleik á vøllinum, tá Brøndby í vinardysti vann 3-0 á Skjold

DANMARK
Jákup Mørk

Nýggi føroyski spælarin í superliguni, Jón Rói Jacobsen, slapp alt fyri eitt at royna seg í nýggja felagi sínum.

Fríggjadagin var hann við í Danmarkarflogfarinum, tá leiðin gekk til Brøndby, og longu dagin eftir var hann við í hópinum, tá Brøndby leikti venjingardyst móti Skjold, sum er á fjórða plássinum í næstbestu donsku deildini.

Brøndby vann dystin 3-0 við trimum málum frá Peter Foldgast, men úr einum føroyskum sjónarhornið var stuttligasta staðfestingin helst, at Jón Rói longu nú slapp at royna seg í dysti.

Ivaleyst var tað ein fyrimunur fyri føroyska landsliðsmannin, at talan var um graslíki, og hóast hann ikki hevði so nógv at gera í verjupartinum, so var talan eftir dystin um rósandi orð frá Michael Laudrup.

- Nú var verjan hjá okkum ikki undir nøkrum serligum trýsti, men hann (jón Rói, blðm.) kom væl frá uppgávuni, og tað er sjónligt, at hann hevur gjørt nógv við venjingina í vetrarsteðginum, vóru boðini frá Michael Laudrup.

Hondbóltsstøður

1. deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VB	3	3	-	0	-	0	385	318	67	15
2 VÍF	4	2	-	1	-	1	370	305	65	13
3 Kyndil	3	2	-	0	-	1	364	364	0	10
4 Stjørnan	3	1	-	0	-	2	317	319	-2	10
5 Neistin	4	1	-	0	-	3	315	342	-27	7
6 StÍF	3	0	-	1	-	2	350	380	-30	7
7 Tjaldur	2	1	-	0	-	1	280	353	-73	3

1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VÍF	2	1	-	0	-	1	434	356	78	11
2 Neistin	2	1	-	0	-	1	395	365	30	11
3 StÍF	1	0	-	1	-	0	375	323	52	10
4 Kyndil	2	0	-	1	-	1	368	373	-5	7
5 KÍF	2	1	-	0	-	1	360	383	-23	7
6 H71	2	2	-	0	-	0	360	408	-48	7
7 Tjaldur	1	0	-	0	-	1	321	405	-84	3

Máltindarnir

Kvinnur

Daiva Tuomaite	VB	118	(23)
Asta Petrauskiene	StÍF	118	(36)
Sóley Mikkelsen	VÍF	107	(39)
Simona Dziugyte	Neistin	106	(33)
Danijela Ercevic	Stjørnan	104	(31)
Lotte Sørensen	Kyndil	104	(52)
Reda Kurkauskiene	VB	98	(16)
Milica Ergic	Tjaldur	92	(19)
Natasja Stamenkovic	Stjørnan	72	(4)
Alina Olaru	StÍF	71	(7)
Lenka Ribaric	Tjaldur	71	(19)
Nicoleta Radu	VÍF	65	(1)
Jacklin Durhuus	VÍF	63	(6)
Laila Jespersen	VB	54	
Ileana Manolescu	Kyndil	54	(9)

Menn

Dragisa Stojovic	Tjaldur	114	(14)
Damir Oros	KÍF	103	(23)
Sveinur Justinussen	StÍF	97	(17)
Halgir D. Olesen	H71	96	(2)
Morgan Knezevic	Neistin	88	(21)
Jacob Jónsson	Kyndil	86	(7)
Ingi Olsen	VÍF	79	(18)
John Zachariasen	VÍF	72	
Áki Mørk	Neistin	72	(20)
Áki Olsen	VÍF	68	(5)
Costin Dumitrescu	StÍF	61	(12)
Finnur Hansson	Kyndil	58	(10)
Niels Viggo Niclassen	H71	56	
Petur Martin Poulsen	KÍF	55	
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	55	(19)

Flogbóltsstøður

Meistaradeild, kvinnur

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 Mjølnir	15	12	-	3	40	14	26	17
2 ÍF	15	12	-	3	40	18	22	16
3 TB	15	11	-	4	38	15	23	14
4 Dráttur	15	6	-	9	23	35	-12	7
5 Fleyr	15	3	-	12	13	38	-25	5
6 KÍF	15	1	-	14	8	42	-34	1

Meistaradeild, menn

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 ÍF	12	10	-	2	32	8	24	12
2 Mjølnir	12	8	-	4	26	17	9	11
3 SÍ	12	6	-	6	20	20	0	9
4 Fram	12	6	-	6	22	20	2	8
5 Fleyr	12	0	-	12	1	36	-35	0

FAMILJU- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Eitt starv í móttøkuni í Familju- og heilsumálaráðnum og Almannaráðnum, við starvstíð 1/2 dag seinnapart verður við hesum lýst leyst til setan sum skjótast eftir nærri avtalu.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum:
Passa vekslaran
Umsiting av bókasavninum
Dagligu umsitingina av klokkuskipanini
Umsiting av postinum
Nakað av vanligum skrivstovuarbeiði
Annað fyrifallandi arbeiði

Vit hugsa okkum at tú hevur:
Góðan førleika sat samskifta
Kunnleika til arbeiði í vekslara
Kunnleika til EDV á brúkarastøði
Góð samstarvsevni

Lønar- og setanartreytir:
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið er skipað á Fyrisitingarligu eindini undir Familju- og heilsumálaráðnum, sum røkir felagsfunktiónir fyri bæði Familju- og heilsumálaráðið og Almannaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hansu Sørensen, deildarleiðara, tlf. 30 40 50.

Umsókn:
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til:

Familju- og heilsumálaráðið
Eirargarði 2
FO 100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 18. februar 2003. kl. 12.00.



Rør&Blikk

RØR & BLIKKSMIÐUR

Søkt verður eftir fólki við royndum innan HVS arbeiði.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn, tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo

SJÓVAR KOMMUNA

Lýsing

Heitt verður á borgarar í Sjóvar kommunu - innan 14 dagar - at beina fyri bilvrakum, ið standa á privatum og almennum øki.

Verður hetta ikki gjørt, beinir kommunan fyri teimum fyri eigarans rokning.

Sjóvar kommuna

Ognir til sølu

Vegna Føroya Skiftirætt verða hesar ognir lýstar til sølu.

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja ímillum innkomin tilboð og ongum at taka av.

Handilsbygningur í Vági:
Ein handilsbygningur á leigaðum øki, matr. nr. 306d, Vági.

Bygningurin er til støddar umleið 7x14 metrar í tveimum hæddum við lágum ovasta lofti.

Bygningurin er bygdur í 80-unum, stendur væl fyri og er væl hóskandi til handil og onnur vinnulig endamál.

Ein Ford Granada 2.3, stationcar:
Bilurin er 18 ára gamal, og er ikki skrásettur í løtuni.

Sethús í Syðrugøtu:
Talan er um ognina matr. nr. 170, Syðragøtu. Grundøkið er 703 m². Húsini eru í einari hædd á umleið 90 m² við hálvum kjallara.

Húsini standa væl fyri og útsýnið er gott.

Hús í Vestmanna:
Við hesum verður sethúsaognin matr. nr. 148 d og 176, í Vestmanna lýst til sølu.

Grundøkið er tilsamans 656 m². Húsini eru umleið 60m² í kjallara, miðhædd og lofti.

Kjallari: Óinnrættaður.

Miðhædd: Gangur, baðiverilsi, køkur og 2 stovur.

Loft: Úti á lofti, hjúnarúm og 2 kømur.

Talan er um eini eldri hús, ið standa væl fyri og við sera góðum útsýni.

Á ognini er stórt úthús.

Hús í Klaksvík:
Um nóg høgt boð fæst verða húsini á Heygavegi 60 seld.

Húsini eru bygd í 1964 og grundøkið er 352 m² til støddar.

Húsini eru 108 m² í tveimum hæddum umframt hjall.

Umleið 60 m² stór íbúð er í kjallarahæddini.

Nærri upplýsingar um omanfyri standandi ognir fáast við at venda sær til undirritaðu..

Advokatskrivstovan
Fr. Petersensgøta 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Paturssun, adv.
Christian Andreasen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Ó. J. Kristoffersen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

Visti tú ikki tað?